Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Sólvit E. Nolsø, løgtingsmaður

Svarari: Dennis Holm, landsstýrismaður í fiskivinnu- og samferðslumálum

Evni: Vegurin í Sandslíð

Spurningar:

1. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrismaðurin við vegnum í Sandslíð?
2. Er ætlanin at halda fast í tí, ið samferðsluætlanin leggur upp til?
3. Eru dagførdar kostnaðarmetingar gjørdar upp á loysnirnar í Sandslíð?

Viðmerkingar:

At tunnilin í Sandoynna er latin upp fyri ferðslu er eitt frambrot fyri Sandoynna.

Tunnilin fer tó eisini at hava við sær, at ferðslan í oynni mest sannlíkt fer at økjast. Partur av vegakervinum í Sandoynni er ikki gjørt til at klára nógv meira ferðslu.

Ein av hesum teinum er Sandslíð, ið er líðin, tá tú koyrir av Sandi og til bygdirnar eystanfyri. Havandi í huga, at ein stór byggiverkætlan eftir ætlan skal í gongd í Skálavík og at ein tunnil til Suðuroynna helst fer niður í Djúpadali, er tað ikki bara ein økt vanlig ferðsla, sum fer ígjøgnum Sandslíð, men eisini tyngri ferðsla.

Sambært samferðsluætlanini hjá Landsverki er ætlanin at fara undir at dagføra Sandslíð í 2025, og tvær loysnir eru skotnar upp. Onnur er at dagføra verandi leið til tvær breytir og tryggja leiðina móti omanlopi. Hin loysnin er at dagføra verandi veg og gera ein stuttan tunnil (uml. 400 metrar) á Líðarenda, har vegurin er trupul at breiðka.
Fyrra loysnin er í 2018 mett at kosta millum 25 og 35 milliónir krónur og seinna loysnin er mett at kosta millum 290 og 350 milliónir krónur.

Landsverk mælir til fyrru loysnina og verkætlanin er mett at taka eitt ár.

Á fíggjarlógini eru 23 milliónir settar av til Sandslíð í 2025 og aðrar 23 milliónir í 2026.

Á Løgtingi, 2. januar 2024

Sólvit E. Nolsø